Lesarabrøv

Friðingin burturvið

Eg las greinina hjá Jens Kjeld Jensen í Dagblaðnum tann 18. oktober um friðingina av lomviganum við Føroyar alt árið, og eri eg so púra samdur við honum í ti hann skrivar.

Hvat skulu vit føroyingar til at friða fuglin hjá øðrum londum, tann íslendska og enska fuglin, sum kemur higar at eta seg feitan fyri síðani at fara aftur til hesi londini at verða dripin.

Skulu vit nú til at avreiða fuglin við Føroyar eins og vit hava avreitt laksin til íslendingar, hvat so við toskinum, ið svimur við Føroyar?

Verður hann tann næsti, ið verður avreiddur, og um so verður, hvør skal so hava hann?

Skulu Føroyar bert liggja her sum eitt fitilendi hjá øðrum?

Nei, Arne Nørrevang, passa tú títt og blanda teg ikki upp í tað, sum tú ikki hevur forstand uppá, kanna tú heldur t.d., sum Jens Kjeld skrivar, hví ongin tarabrosma er við Koltur.


Er tað kanska tí onki fólk býr í Koltri?

Hví kannar tú ikki hvat ið ídnaðartrolararnir oyðileggja undir Føroyum og hvussu nógv prosent av toska- og hýsumurti eru í hvørjari last?

Eftir tínum úttalilsum skuldi ein trúð at tú stóð ovast á listanum til formanspostin hjá Greenpeace.

Nei, lat okkum í hesum førinum gera sum teir donsku veiðimenninir, beskatta tann íslendska og enska fuglin, sum kemur higar um veturin og fer avstað aftur, í ríkiligan mun.

Nei, veiðimenn í Føroyum, latið okkum standa saman ímóti hesum Greenpeace-monnum, sum bara vilja friða fyri at



hevja seg upp og sum ikki hava skil fyri tí teir friða.

Vónandi fáa byrsumenninir nógvan íslendskan og enskan fugl í ár og lata merkini inn til Jens Kjeld Jensen, ið er tann einasti í Føroyum, sum hevur prógv fyri, at tað ikki er føroyskur fuglur, sum verður skotin í Føroyum.

Við fuglakvøðu

Hans Madsen
410 Kollafjørður

P.S. Tað skuldi ikki verið neyðugt at skriva til løgtings- og landsstýrismenninar »privat« um friðingina, tí teir eiga at vera so mikið at sær komnir, at teir ikki fara at friða fuglin hjá øðrum.

Avreksverk umborð á »Ennibergi«

Vísandi til greinir í Sosialinum nr. 140 og 156 í ár viðv. **Gullnál fyri bjargingaravrik**, tori eg at loyva mær (ónavngivin) at gera vart við eina hending, sum fór fram fyrst í juli 1990. Tað var tá ið eldur kom í trolaran »Enniberg«. Hjálagt sendi eg kut úr norskum bløðum, sum skrivaðu nógv um hendingina. Føroysku bløðini søgdu ikki nógv, men Útvarpið bar dagin eftir á middegi tíðindi um hendingina og segði m.a. — eftir at hava tosað við reiðaran, at tað var maskinstjóranum — sum bar seg so skjótt at — fyri at takka, at skaðin varð ikki nógv størri. Maskinstjórin var tá hin bert 23 ára gamli William Hjelm Nielsen.

Vónandi fær hetta avreksverk viðurkenning.

Ein, ið hevur biðað eftir at, viðurkenning varð givin hesum unga manni


Brann på fabrikkskipet Enniberg:

«Tenkte på Scandinavian Star»



Tråler i brann

Dramaet endte godt



Eitt hjartasuff!!!

Harra blaðstjóri, vinarliga hýsið mær hesum hjartasuffi:

Nú eri eg troyttur av at hoyra eina útvarpssending fyri og aðra eftir, síggja eina sjónvarpssending fyri og aðra eftir, lesa eina blaðgrein fyri og aðra eftir um skúlanæmingar okkara.

Niðurstøðan hjá hesum fólkum, sum traðka fram í fjølmiðlunum er: at næmingarnir vita onki um AIDS, teir fáa onki at vita um kynslívið, útbúgvingarmøguleikar vita teir so slettis onki um, ja og so duga teir heldur onki!!

Hvat halda tit eg hugsi, sum havi arbeitt við hesum í skjótt 25 ár og geri tað dagliga? — altso, hvat halda tit vit lærarar gera í skúlanum?

Eg havi mangan í seinastuni ætlað at taka til pennin, men havi hugsað, at eg bert kann svara fyri meg sjálvan, men nú gjørdist ovboðið. — Tað allarseinasta er, at Marner Simonsen vil hava ung fólk og ljósmøður inn í skúlarnar at frálæra í nøring og kynsjúkum o.ø.

Hvussu leingi skulu vit lærarar tigandi leggja oyra til slíkt?

Vælsignaðir starvsfelagar: gevið ljóð!

Vinarliga

Robert Mc. Birnie
Lærari á Venjingarskúlanum, Tórshavn

Minnist haldaragjaldið!

Takið lut í politiska kjakinum!
Tak lut í teim mongu tiltøkunum, sum Suðurstreymoyar Javnaðarfelag skipar fyri.
Tekna teg sum lim.

☐ Ja, eg tekni meg sum lim í Suðurstreymoyar Javnaðarfelag

Navn: _____

Bústaður: _____

Verður sent ópostað. Móttakarin rindar postgjaldið.
204

Suðurstreymoyar Javnaðarfelag
Box 76
110 Tórshavn

Kannað postverkinum